

G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!

# Linjurættur búskapur og ringrásbúskapur

Næmingabók, síða 10-13

Førleikar:

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.

Linnjurættur búskapur merkir m.a., at ting verða tveitt burtur, tá tey eru nýtt.

- Les og skil modellina saman við næmingunum.
- Veljið nøkur ráevni (t.d. kopar, træ ella frukt) og gerið hugarok um hvussu hesi ferðast gjøgnum búskapin.
- Hvørjir kostnaðir eru í ymisku liðunum?




Um næmingarnir skilja hesi viðurskifti væl, ber eisini til at tosa um orkunýtslu og burturkast í ymisku framleiðsluliðunum.

- Hvør orkunýtsla er í ymisku liðunum? Skrivið stikkorð á myndina.
- Hvat burturkast stendst av ymisku liðunum? Skrivið stikkorð á myndina.





G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!

Ringrásbúskapur merkir, at ting verða endurnýtt, heilt ella partvíst. Skilt verður viðhvørt millum hugtøkini “endurnýtsla”, har framleidda vøran verður nýtt aftur, og “endurvinning”, har brúkta vøran verður pettað sundur í smærri lutir – ella enntá í grundevni.

- Velið nøkur ráevni, ið kunnu endurnýtast.
- Setið orð á brotstrikurnar á seinnu myndini.



Dugnaligir næmingar megna at skilja hesa myndina. Til ber eisini at fáa meiri vitan á hesi heimasíðuni: https://cirkulaer.com/2017/05/24/cirkulaer-oekonomi/

